# Ingvard Thorsteinson 75 ár


Bjarni Brattaberg, Ingvard Thorsteinson og Danjal Petur Thorsteinson
Mynd: Eyðun Brattaberg

**Fyri viku síðani fóru teir við kalvalínu og komu aftur at landi við 37 kalvum og í alt var fongurin 1300 pund. Ikki er hann uppilagstur enn og í dag fyllir Ingvard Thorsteinson 75 ár**

KALVALÍNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í dag fyllir Ingvard Thorsteinson í Vági 75 ár. Tað er ikki meira enn vika síðani, at hann var við bátinum hjá Bjarna Brattaberg, Norðfarið, og teir settu kalvalínu.

Teir komu aftur at landi við stórum fongi. 37 kalvar og í alt var fongurin 1300 pund. Við vóru Bjarni Brattaberg, Ingvard Thorsteinson og Danjal Petur Thorsteinson, ið eisini er kendur sum ánari av Skarv í Keypmannahavn.

Tá teir næstsíðsta leygardag sigldu longur úteftir, tá aðrir sigldu inn, í baldruta sjónum, gav tað vinning.

Teir hva verið á Munkagrunninum, tað teir rópa Uttan Stein, og eisini er Lítla Dímun nýtt sum ýti og hava teir roynt á Stronginum, har sera streymhart er.

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Martina G. F. Ejdesgaard**
Eiði

doyði og varð jarðað.
Tøkk øll tit mongu, ið hava rætt eina hjálpandi hond.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á Korndalsbýlinum.
Somuleiðis tøkk til tykkum, ið fylgdu og mintust hana á ymiskan hátt.

*Familjunnar vegna*
**Hansy, Poul Knud og Simon Pauli**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Johanna Jacobsen** av Eiði, vanliga nevnd Johanna í Pállshúsi, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 94 ára gomul. Bønarhald verður í landssjúkrahúskapellinum mikudagin klokkan 18:00. Kistan væntast í Eiðis Kirkju klokkan 19:30. Jarðarferðin verður úr Eiðis Kirkju hósdagin 14:00. Tey, ið ynskja at minnast Johonnu, kunnu lata Missiónshúsinum á Eiði eina gávu, konto í pengastovnunum.

## Herviligi Henry er aftur




Á bókasøvunum vita tey at siga, at bøkurnar um Herviliga Henry eru millum tær best umtóktu hjá føroyskum børnum. Nú kunnu børnini gleða seg, tí Bókadeildin hevur júst givið tvær spildurnýggjar bøkur út um óskikkiliga drongin, sum øll elska at hata. Í bókini *Herviligi Henry hevnir seg,* hóttir Henry við, at øll skulu fáa av at vita, tá hann verður kongur. Í hinari bókini *Herviligi Henry og mumiubanningin* síggja vit, hvussu tað gongur, tá komandi kongurin Henry skal læra seg at stava.

## Torgdagar í SMS




Hósdagin 17. til leygardagin 19. juli skipar SMS fyri marknaðardøgum á torginum. Privatpersónar, stovnar og fyritøkur hava møguleika at vera handilsfólk í SMS í tríggjar dagar, hósdagin, fríggjadagin og leygardagin, og selja alt millum himmal og jørð. Hetta er eitt gott høvi hjá Per og Pól, Lenu og Marsannu og øllum hinum at vísa sínar vørur fram í nógv vitjaða handilshúsinum. Í tíðindaskrivi frá SMS verður sagt, at ætlanin er at hava slíkar torgdagar tvær ferðir um árið.

## Heimsmeistari til Klaksvíkar

Tað verður eftir øllum at døma talan um harða kapping, tá besti egnarin skal finnast á Sjómannadegnum í Klaksvík tann 16. august. John Havn hevur higar til verið vinnarin av kappingini, men í HM-kappingini í fjør mátti hann lúta fyri Kjell Ovesen úr Kjøllefjord í Noreg. Norðlýsið skrivar, at Kjell Ovesen hevur boðað frá, at hann verður við í kappingini í Klaksvík, og so verður spennandi at vita, um John – ella annar føroyingur – hesa ferð megnar at knógva norska heimsmeistaranum.

## Tillukku við føðingardegnum!

HENRIK OLD



Sá landsstýriskvinnuna í vinnumálum, á sjónvarpsskerminum, speirekandi fortelja føroyingum, at nú var ikki ætlanin at byrja Sandoyartunnulin føðingardagin hjá einum ávísum persóni, 1.nov 2009. Sjálvandi sipar hon til Gerhard Lognberg.

Søgan aftanfyri semjuna, ímillum teir 3 táverandi samgonguflokkarnar í vinnunevndini um 1.nov 2009, er ein heilt onnur. Sambandsflokkurin vildi byrja tíðliga í 2010, tí tá var gjaldið hjá landskassanum til Norðoyartunnulin liðugt.

Síðsta gjaldið til Norðoyatunnulin uppá 43 milliónir skal fella í 2009. So tá var roknað við, at um sama játtan sum løgtingið hevði játta síðstu 10 árini til tunnilsgerð helt fram, so kundi byrjast um hatta mundi.

Onkur vildi byrja áðrenn, millum hesar var Gerhard Lognberg. Men her skuldi finnast ein semja og hana skuldi eg finna. Aftaná at hava togast aftur og fram eina tíð, fekst semja við Sambandsflokkin í vinnunevndini, sum var umboðaður av Johan Dahl, um at byrja 1.nov. Síðan segði eg Gerhardi frá, at um ikki alt skuldi detta á gólvið, so mátti hann góðkenna 1.nov. 2009.

Á hendan hátt bleiv semjan um tann nógv umtalaða 1.nov. 2009 gjørd, og ikki sum Bjørt Samuelsen, sera niðurgerðandi royndi at siga hyggjarunum frá, at tað var ein ávísur føðingardagur, ið var orsøkin.

Um landstýriskvinnan gjøgnumgekk alt tað tilfar, sum fylgdi við í vinnunevndini um m.a. fíggingarhátt, so hevði hon sæð, at nevndin valdi at fylgja tilmælinum frá Fíggjarmálaráðnum um ikki at leggja Sandoyartunnulin í eitt partafelag.

Hetta var serliga eftir ynski frá Sambands- og Tjóðildisflokkinum.---Fókaflókkurin tók undir við Bjarna Djurholm landstýrismanni um partafelagsloysnina, men gingu tó við til omanfyrinevnda fíggingarhátt á sama hátt sum vit í Javnaðarflokkinum, fyri at málið skuldi fáa so breiða undirtøku í Løgtinginum sum gjørligt.

**Skálafjarðartunnilin**

Tað var sera hugaligt at viðgera uppskotið um Skálafjarðartunnilin í vinnunevndini. Serliga áhugavert var, at møta øllum teimum fólkunum, sum høvdu tikið stig til hesa framburðsætlan sum ikki skuldi kosta landskassanum eina krónu. Tvørturímóti skuldi landskassin fáa nógvar milliónir burturúr hesum stórverki.

Tað hevði verið spennandi at sæð, um tann privati felagsskapurin hevði megna at gjøgnumført Skálafjarðartunnilin.

Ístaðin fyri at lagt sína køldu hond á hesa ætlan, skuldi landstýriskvinnan heldur fylgt løgtingsins vilja, og farið í samráðingar við partafelagið um treytirnar fyri loyvinum at byggja Skálafjarðartunnulin.

At heingja 2 milliardir í veðhaldi um hálsin á landskassanum, og billa fólki inn, at soleiðis kann man fíggja Sandoyartunnilin einafærð úti í framtíðini, mugu tað ikki vera nógv ið trúgva uppá.